






# Góð og vælhildin hús við framúrskarandi útsýni

Í friðarliga og barnavinarliga umhvørvinum úti á Argjum, við ein blindveg, standa hesi sera hugnaligu og vælhildnu húsini, sum eru høvuðsumvæld í 2000. Her varnast tú beinanvegin, at tey, sum búgva í húsinum ynskja, at alt er vælhildið, snøgt og hugnaligt – bæði innan og uttan.

Ein gongugøta er frá húsinum og út á Hamaran har nýggjur skúli verður bygdur. Eisini er stutt til vøggustovu og barnagarð.

Framman fyri húsini er ein vakur og sermerktur urtagarður við fleiri runnum, vøkrum blómum og nógvum hugnaligum krókum. Her eru góðir møguleikar hjá teimum, sum hava hug at fáast við urtagarðsarbeiði - ella bara at nýta tær góðu løturnar í urtagarðinum.

Útsýnið er framúrskarandi og sært tú nærum alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin.

Høvuðsinngongin er frá niðaru hæddini. Kenslan tú fært tá tú trínur inn í húsini er at stílurin ber brá av heitum suðurlendskum stíli. Fyrst kemur tú inn í eina ljósa og góða gongd, síðani er ein grovkøkur, eitt baðirúm við baðikar og trý kømur. Í niðaru hæddini eru eisini tvær smærri terassur – tann eina er út frá kamarinum, sum vendir omaneftir og hin er út frá kamarinum, sum er á ovaru síðu á húsinum.

Í ovaru hæddini eru køkur og stova, í einum rúmi, eitt baðirúm við brúsu, tvey kømur og ein hjallur. Hvítvørurnar í køkinum eru frá 2007. Frá stovuni er eitt einastandandi útsýni. Ein stór og góð terassa er út frá køkini við góðum møguleikum fyri at grilla, gott pláss til at hava havamøblar, krukkur o.a. standandi á. Ein altan gongur út frá stovuni.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adr.: | Hagagøta 6, Argir |
| Byggiár: | 1973 |
| Hæddir: | 2 |
| Stødd innan: | 183 fermetrar |
| Grundøkið: | 521 fermetrar |
| Prísuppskot: | Kr. 3.000.000,- |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**